Kommunufelagið

Umhvørvismálaráðið

Dagfesting
20. september 2024

Okkara j.nr.
22/02419

Málsviðgeri
JH

Tygara j.nr.
20/02113

**Ummæli av uppskoti til kunngerð um burturkast**

Dagførda uppskotið til burturkastkunngerð, sum fyrstu ferð var til hoyringar miðskeiðis í 2022, kom aftur í almenna hoyring fyri summarfrítíðina.

Sum felagið lesur uppskotið verður avleiðingin av uppskotinum, at kommunali geirin – bæði IRF og kommunurnar hvør sær – samanlagt skal gera íløgur fyri tíggjutals milliónir krónur í innsavning, móttøku og handfaring av burturkasti. Eftir øllum at døma uttan at so mikið sum ein króna verður játtað frá landinum til endamálið.

Somuleiðis eru krøvini so strong og umfatandi, at meginparturin av kommunalu endurnýtslu- og byngjuplássunum kring landið mugu lata aftur.

Við øðrum orðum skulu kommunurnar rinda fyri umhvørvispolikkin hjá landinum og tøkkin til borgarin, sum skal gjalda, er at kommunan sannlíkt steingir staðbundna endurnýtsluplássið.

<u>Hetta kunnu vit sjálvsagt ikki góðtaka, og felagið krevur tí, at landsstýrið alt fyri eitt steðgar á og fær hetta málið aftur á beint.</u>

Sum nú er, er ikki talan um eitt uppskot, ið kann sigast at verða orðað "*í samráð við kommunurnar*", eins nevnt verður í innganginum. Neyðugt er at hava eitt veruligt samskifti við kommunurnar um hetta uppskotið og gera tær greiningar, sum eru neyðugar fyri at kenna avleiðingarnar av tí, sum man ætlar at gera. Og, ikki minni, so man fær skapt eitt regluverk, sum umhvørvisliga og samfelagsbúskaparliga er í javnvág.

Burturúr rúgvuni kunnu vit vegna kommunurnar nevna hesi týðandi atfinningar og ivamál, sum vit hava í mun til fyriliggjandi uppskot:

**Kommunurnar mugu gera munandi íløgur**

Ongin kommuna hevur í dag umstøður, sum gera tað møguligt at lúka krøvini í kunngerðini. Tørvur verður á stórum plássum og umstøður skulu vera til bæði at arbeiða og goyma

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo

burturkast undir taki. Hetta er nakað heilt annað enn flestu kommunur í dag hava gjørt seg út til.

Nakrar heilt fáar kommunur skulu bert gera smærri útbyggingar, meðan talan verður um heilt munandi útbyggingar fyri aðrar kommunur. Harumframt koma tær íløgur, sum liggja hjá IRF.

Samanumtikið er metingin, at kostnaður fyri kommunala geiran verður tíggjutals milliónir krónur, um kunngerðin skal haldast.

Vil landið gera hesa raðfesting, má man gera eina fíggjarliga greining av, hvørjar útreiðslur og inntøkur eru av broytingunum, og síðani raðfesta játtan úr landskassanum til endamálið.

Tað kann ikki vera meiningin, at kommunurnar skulu gjalda fyri landspolitiskar ætlanir á burturkastøkinum.

**Endurnýtslupláss mugu lata aftur**

Tað kann ikki góðtakast, at tað verða sett so høg krøv til handfaring av burturkasti, at tað vegna stórar íløgu- og rakstrarkostnaðir í veruleikanum ikki verður loyvt hjá kommunum at hava staðbundin endurnýtslupláss.

Hetta fær uttan iva eisini neiligar umhvørvisligar avleiðingar við tað, at fólk og fyritøkur í størri mun enn í dag fara at skaffa sær av við burturkastið á ólógligan hátt. Samstundis missa kommunurnar møguleikan at veita borgarum sínum ta tænastu, at borgararnir kunnu sleppa av við burturkastið umvegis eina staðbundna skipan í nærumhvørvinum.

Um ynskið er ein enn meiri einstáttað skipan kring landið eru møguleikar at gera hetta á ein hátt, sum loyvir smærri plássunum at varðveita eina ávísa burturkastmóttøku. Kunngerðin kundi til dømis býtt endurnýtsluplássini í ávísar bólkar, sum skulu lúka ávís og stigvíst veksandi krøv. Til dømis kundu heilt smáu plássini komið undir eina skipan, smærri kommunur undir eina aðra, og miðalstóru og størstu kommunurnar eina triðju.

**Reguleringin av økinum kann ikki fara fram á eini heimasíðu**

Lagt er upp til, at ein týðandi partur av reguleringini av hesum øki skal ásetast í "*Treytir fyri handfaring av burturkasti*", sum skal almannakunngerast á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni.

Vit góðtaka ikki at týðandi treytir fyri eitt øki, sum kommunurnar varða av, verða settar á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni. Tað er eisini meiri enn ivasamt, um hetta í heila tikið er lógligt at gera – altso, at gjøgnumføra nýggja ella broytta regulering á einari heimasíðu. Tað

gongur heilt einfalt ikki, at treytirnar kunnu broytast frá degi til dags – og als ikki á einum øki, sum landið ikki sjálvt varðar av.

Ásetingar í lóg og kunngerð mugu vera støðugar. Og tað rætta er sjálvsagt – sum man hevur gjørt aðrastaðni – at gjøgnumføra eina vanliga hoyringstilgongd og síðani seta meiri tekniskar ásetingar inn í kunngerðina sum fylgiskjal.

**Kommunal burturkastætlan fyri alt landið**

Uppskotið er ov ógreitt í mun tað, sum okkum upplýst skal vera ætlanin við uppskotinum, nevniliga at tað skal vera ein kommunal burturkastætlan fyri allar kommunur. Tað er ikki skynsamt, at 29 kommunur hvør í sínum lagi skulu gera slíkar ætlanir.

Tað eigur tí at verða nágreinað, at tað verður gjørt ein felags kommunal burturkastætlan, sum er galdandi fyri alt landið.

**Taka ikki undir við serstakari fíggjarætlan og ársroknskapi**

Í § 12, stk. 3, verður millum annað ásett, at "*Kommunustýrið skal á hvørjum ári samtykkja serstaka fíggjarætlan og serstakan ársroknskap fyri burturkastsøkið og kunna borgararnar um hesi.*"

Flestu kommunur útgreina í dag bæði rakstur og íløgur fyri burturkastøkið í teirra árligu fíggjarætlanum og roknskapum. Somuleiðis ger IRF sín serstaka roknskap. Alt hetta eru upplýsingar, sum longu í dag skulu almannakunngerast sambært galdandi reglum. Ein og hvør borgari, sum hevur áhuga í hesum viðurskiftum, kann ómakaleyst leita upplýsingarnar fram ella venda sær til kommunurnar.

Hetta er tí eftir okkara tykki púra óneyðugt skrivstovuveldi og ásetingin eigur at verða tikin úr uppskotinum.

**Uppskotið eigur ikki at forða fyri menningini av kommunufelagsskapum**

Sambært § 13 kann kommunan leggja sínar uppgávur eftir kunngerðini til ein kommunufelagsskap at umsita. Ásetingin er tó bert galdandi fyri nøkur ávís viðurskifti. Eftir okkara tykki kann hetta gerast ein forðing fyri framhaldandi menningini av kommunufelagsskapinum.

Orðingin eigur tí at verða broytt soleiðis, at allar uppgávur og heimildir sambært kunngerðini kunnu leggjast til kommunufelagsskapin.

Kommunufelagið

Í sama viðfangi kann nevnast, at § 14 tykist vanta eina heimild til kommunurnar at samstarva um eina innsavningarskipan – svarandi til ta heimild, sum t.d. er í § 15, stk 5.

**Ivasom heimild**

Sambært § 4, stk. 2, skal kommunan hava heimild at "*syrgja fyri at fáa burturkastið latið til innsavningarskipanina ella avhendingarskipanina*", um eigarin av matriklinum ikki aktar boð frá kommununi. Felagið ivast í, um hendan áseting hevur nakað veruligt innihald í tí støðu, har eigarin ikki vil loyva kommununi atgongd til ognina.

Eftir okkara tykki vantar ein lógarheimild til kommununa at skaffa sær atgongd uttan rættarúrskurð í tílíkum føri. Somuleiðis vantar ein atgongd til at innkrevja útreiðslurnar umvegis panting, sum hevði verið tað skilabesta í einum føri sum hesum.

**Drálið hevur seinkað kommunalum íløgum**

Hóast omanfyrinevndu atfinningar og ivamál eru fleiri góð viðurskifti í hesi kunngerð. Tað er tó ógvuliga harmiligt, at hetta arbeiðið hevur drigið so nógv út.

Kommunurnar hava væntað eina nýggja regulering av økinum í fleiri ár. Av tí sama hava fleiri kommunur aftrað seg við at gera neyðugar betringar og ætlaðar útbyggingar av teirra endurnýtsluplássum. Orsøkin hevur verið tann einfalda, at man ikki hevur viljað raðfest íløgur til eitt øki, sum nýggj regulering var væntandi um.

Hendan støðan er enn galdandi, og tí er okkara vón at landið nú vil taka um veruligar samráðingar við kommunurnar um hetta økið og gera tær greiningar, sum skulu til fyri at bera hetta á mál.

Víst verður at enda til hjáløgdu viðmerkingar frá Runavíkar kommunu, og til tey ummælisskriv sum okkum upplýst verða send ráðnum frá Tórshavnar kommunu og IRF.

Vegna
Kommunufelagið

| | |
|---|---|
| Torbjørn Jacobsen<br>formaður | Eyðun Christiansen<br>stjóri |

**Viðmerkingar til uppskot til kunngerð
um
burturkast**

Uppskotið til kunngerð um burturkast kemur at hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar innanfyri eitt lutfalsliga stutt tíðarskeið. Uppskotið førur við sær, at móttøkustøðirnar, tvs. ruskplássini, skulu útbyggjast av tí at burturkastbólkarnar framyvir skulu skiljast hvør sær. Tað krevur planlegging, víðkan av móttøkustøðum og keypa av nýggjari útgerð. Tað er sera óheppið, at ein kunngerð viðførur fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Avhendingarskipanin skal tó ikki lúka tey nýggju krøvini fyri móttøkustøð fyrr enn í 2030. Men fyri at lúka krøvini kemur kunngerðin at ávirka fíggjarætlanararbeiðið.

Tað verður vónandi ein fyrimunur, at tað sum bleiv umtalað sum "bilvrak" í uppskotinum frá 2022, nú verður umtalað sum "akfør, sum hava tænt fyri seg" í §3, stk. 3. Tó kann enn verða ivamál um hvat tað merkir, av tí at eitt akfar uttan nummarplátur, sum ikki longur kann koyra, kann verða brúkt til at hava standandi til eykalutir. Tá tænir akfarið einum endamáli fyri eigaran.

Í §3, stk. 2, stendur at gomul og ónýtilig før skullu høggast upp á upphøggingarstøð við umhvørvisgóðkenning. Tað hevði verið ein fyrimunur, sum tað eisini fevndi um akfør, sum hava tænt fyri seg. Á tann hátt kann man vónandi fyribyrgja at fleiri akfør, sum hava tænt fyri seg, standa hálvtupphøggaði hjá borgara.

Uppskotið til kunngerð um burturkast gevur ikki smærri ruskplássum, sum ikki eru á útoyggj, beinleiðis møguleikan fyri at søkja um undantaksloyvi til at halda fram í verandi í verandi líki. Tó letur §14, stk. 4. upp fyri at Umhvørvisstovan kann geva undantak frá ávísum burturkastbólkum í serligum føri. Kommunan kundi hugsa sær at fingið nágreina hvat kemur undir "í serligum føri".

IRF stendur fyri innsavningarskipanini hjá Runavíkar í dag, har tey frá húsarhaldum innsavna battarí, smáan elektronikk, smáar spraydósir o.l., vandamikið burturkast, papp, pappír, bleytt plast og rest- og matburturkast. Alt hetta fer í hvíta, reyða og gráa posa. Tað kundi hugsast at húsarhaldini fáa posar fyri smátt metal og klæðir og klædnavørur. Innsavning av lívrunnum burturkastið frá 2030 vil føra við sær, at borgarin skal kunna goyma tað í einum ílati fyri seg. Í dag er tað soleiðis, at borgarin hevur ábyrgdina av skrellistativinum til ruskposarnar. Um mannagongdin ikki verður broytt verður tað eisini neyðugt fyri borgaran at fáa sær til vega eitt stativ ella spann til lívrunnið burturkast. Tað kann verða neyðugt at kanna hvussu tað skal gerast áðrenn innsavningin av lívrunnum tilfari byrjar í 2030.

Sambært § 12, stk. 3 skal kommunustýrið skal á hvørjum ári gera serstaka fíggjarætlan og serstakan ársroknskap fyri burturkastøkið. Rakstarætlanin fyri burturkastøkið verður á hvørjum ári tikið upp ísv. fíggjarætlanararbeiðið, og har við gjøgnumgingið. Fíggjarætlanin og ársroknskapurin fyri kommununa liggja alment frammi á heimasíðuni. Tí vil kommuna vita hvussu ein serstakur ársroknskapur og serstøk fíggjarætlan skal taka seg út í mun til tað sum higartil verður gjørt.

<u>Viðmerking til §22, stk. 2</u>.: Sambært BK17 pkt. 1.5 kann kommunan eisini seta treytir til niðurtøkuna. Niðurtøkan skal fráboðast kommununi sum byggimyndugleiki.

<u>Viðmerking til §27:</u> Har er skrivað í §27, stk. 2, at §27 kemur í gildi 1. januar 2026. Fyri at greinin um gildiskomu kann virka sum sítt endamál, er neyðugt at §27 hevur gildiskomu í 1. januar 2025 saman við §8. Tí í §27, stk. 1 er skrivað nær §8 verður galdandi.

Skrivað hevur: Jóngerð Juul Olsen, umhvørvisstarvsfólk, Runavíkar kommuna 16-09-2024